# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



25. august fingu Elin Nolsöe Grethardsdóttir og Baldur Helgi Benjamínsson, Reykjavík, eina dóttur. Hon vigaði 3.025 gr. og var 49 cm long.

14. juli 2008 fingu Fía og Pól í Skorini, Glostrup, ein son. Hann eitur Ólavur og vigaði 3750 gr. og var 53 cm. langur.

16. august fingu Jóhanna Magnussen og Rúni Debes, Tjørnuvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3550 gr.

26. august fingu Karina Joensen og Eyðstein Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3200 gr.

27. august fingu Turid Davidsen og Jóhannes Davidsen, Sandavágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3300 gr.

28. august fingu Olivia Berg og Jákup Súni, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4220 gr.

28. august fingu Ann-Mari og Magni Mouritsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3580 gr.

28. august fingu Siborg Jóna Nielsen og Janus Hentze í Stórustovu í Keypmannahavn eina dóttir. Hon varð fødd á Hvidovre Hospital og var 53 cm. long og vigaði 3260 gr.

29. august fingu Vinni og Jørgin Olsen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2950 gr.

30. august fingu Anita Berg og Frívaldur Tindskarð, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4050 gr.

31. august fingu Beinta Bærentsen og Dan Kári Joensen, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3850 gr.

1. september fingu Birgit og Heðin Krett, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3625 gr.

1. september fingu Borghild Tómasson og Sámal Jákup Isaksen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4100 gr.

1. september fingu Anna Eiriksdóttir og Rúni Heðinson, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4250 gr.

1. september fingu Maj-Britt Hellisdal og Johnny Samuelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3750 gr.

2. september fingu Torgunn Jónsdóttir og Ellef Ellefsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3050 gr.

2. september fingu Leila og Bogi Lamhauge, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 56,5 cm. long og vigaði 4000 gr.

2. september fingu Majbritt Lamhauge Jacobsen og Jón Eli Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

**Merkisdagur**
Leygardagin, 6. sept. fyllir Ásbjørg Simonsen á Viðareiði, 70 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin, 7. sept., hjá dóttrini Ansu á Eiðsvíksvegi 1, frá kl. 17. Øll eru vælkomin.

**75 ár**
Hósdagin 4. septembur fylti Viggo Vatnsdal, Skopun 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 6. septembur frá kl. 11-16 í Samljóð, Skopun. Øll eru vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. sept. kl. 14 giftast í Viðareiðis kirkju, Mamy Dahl Sørensen, Viðareiði og Hákun Súni Egilsnes, Vestmanna. Brúdleypsveitslan verður í Vestmanna ítrottarhøll kl. 17.30.

**90 ár**
Thomas Krogh, múrarameistari í Tórshavn - ættaður av Sandi - verður 90 ár 6. septembur. Hann er burturstaddur føðingardagin.

# Haldor Gaardbo 60 ár



Fríggjadagin 5. septembur fyllir Haldor Gaardbo á Toftum 60 ár.

Haldor er sonur Ragnhild og Frank Gaardbo, og hann er elstur av fimm børnum. Haldor Gaardbo er giftur Marjun, fødd við Rætt, og børnini hjá teimum eru Jan, føddur í 1968, ein lítlan ónevndan drong, føddur í 1970, sum doyði sum nýføðingur, og Joan, fødd í 1972, sum doyði í 1995 bert 22 ára gomul. Abbabørnini eru fýra í tali – alt dreingir.

Til dagligt siglir Haldor sum kokkur við Høgaberg, men tá ið hann er heima, er hann ein sera virkin maður. Hann hevur serliga seinnu árini gjørt rættiliga nógv við húsini, og tað mesta hevur hann gjørt einsamallur.

Áðrenn Haldor fór at sigla, fekst hann við ymiskt annað. Millum annað høvdu Marjun og Haldor gamla Oyrahandilin í Oyrunum á Toftum, og hann var eisini maðurin aftan fyri tær kendu Protectin fiskatablettirnar.

Føðingardagurin verður hildin á Svangaskarði leygarkvøldið 13. septembur klokkan 19, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri pápa- og mammubeiggi, abba- og ommubeiggi og langabbabeiggi

**Herluf Haraldsen**
Sandavágur

andaðist og varð jarðaður
Tøkk til Ingu Poulsen Dam fyri góð og troystarrík orð, tøkk til berarar, sangarar og kirkjutænarar.
Hjartans tøkk til heimarøktina í Vágunum, Ellisheimið í Leirvík, og serstakliga tykkum á Ellisheiminum á Sýnuni í Vágum, sum vóru so góð við hann, ta tíðina hann var har og fyri hjálpina við jarðarferðini.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Ellisheimið.
Tøkk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Tummas og Hannus**

## Tøkk

Eg og kona mín vilja á hendan hátt siga tykkum tøkk fyri at tit mintust meg á 75 ára føðingardegnum tann 6. august í ár. Ein stór tøkk til míni børn á Bornholm, fyri at tit gjørdu mær dagin so hugnaligan.

*Um tú vinin eigur,*
*tann tú trýrt væl,*
*Far og finn hann ofta,*
*Tí at ryski grør*
*og hitt síða gras*
*tá eingin á gøtu gongur.*

**Kærar heilsur**
**Henry Jarnskor**

**Dagurin**

**6. september. Magnus**, deyður í umleið 750. Sankta Magnus var einabúgvi, sum saman við fleiri øðrum einbúgvum í langa tíð helt til við Bodenvatnið á markinum millum Týskland og Sveis. Seinni fór hann sum trúboðari til Bayern, har hann læt byggja eitt kleystur. Kemur ofta í bland við aðrar Magnusar, eitt nú ein Magnus, sum sigst at vera tikin av døgum um ár 250, og við tann Magnus, sum magnusarmessa verður hildin fyri. Navnið er latínskt og merkir stórur.

**7. september. Robert**. Teir vita ikki, hvønn sipað verður til, navnið kemur ikki fyri í álmanakkanum fyrr enn í 1728. Kanska er talan um ein abbata í Kent í Onglandi.

**8. september. Mariumessa um heystið**. Hildin sum føðingardagur Mariu. Dagurin er dilkadagur. Tríggir dagar um heystið verða nevndir dilkadagar. Teir eru mariumessa 8. september, mikkjalsmessa 29. september og allahalgannadagur 1. november.